**Magnus Heinason - Túrfrágreiðing**
**Standard hydrografi. Túrur nr. 1742**
**Tíðarskeið 30/8-6/9-2017**

---

**Fólk frá Havstovuni:** Mourits M. Joensen og Regin Kristiansen.

**Ábyrgd:** Karin Margretha H. Larsen

**Endamál:** Endamálið við túrinum var at fylgja við broytingunum í havinum kring Føroyar. Túrurin var ein partur av teimum regluligu kanningunum eftir standardskurðunum. Eisini skuldu vit lesa data úr trimum hitamátarum, sum liggja á botni norðanfyri og vestanfyri.

**Reiðskapur:** Seabird-CTD við rosettu, WP2-glúpur og útgerð at lesa ein hitamátara akustiskt.

**Um túrin:** Vit loystu mikudagin 30/8 kl. 20.
Siglt varð eystur á støð N1. Skurður N varð tikin norðureftir. Tá liðugt var á N14, varð siglt vestur á skurð R, sum varð tikin inn móti Mykinesi. Haðani sigldu vit út í Bankarennuna og tóku skurð K inn móti Koltri. Haðani varð siglt á skurð V, sum varð tikin út á Føroyabanka. Tá hesin skurður var tikin, varð siglt á støð S1 á Munkagrunninum. Skurður S varð tikin ímóti Hetland, men bert til markið, tí vit høvdu ikki loyvi til at fara í bretskan sjógv. Haðani varð siglt norður á skurð E, sum vit tóku inn móti Nólsoy.

Vit vóru aftur á Havnini 5/9 kl. 08:30.

**Prøvataking:** Við Seabird CTD-ini tóku vit 76 støðir. WP2-glúp á 54 støðum.
Á støðunum V6, N14, N13, N4, N5, S8 og á K skurðinum, vórðu prøvar tiknir av tøðsøltum.

**Nær eru prøvarnir upparbeiddir:** Saltprøvarnir verða analyseraðir í heyst.

**Viðmerkingar:** Á positiónunum 61°30,0N 7°34,9V og 62°39,9N 6°04,96V lósu vit data úr tveimum hitamátarum, sum liggja á botni. Tað gekk væl at lesa data, og tók tað minni enn hálvan tíma frá tí, at vit løgdu stilt, til vit sigldu aftur. Á position 62°47,7N 6°04,9V royndu vit eisini at lesa ein hitamátara, men har fingu vit einki samband. Á position 62°59,9N 6°05,0V løgdu vit ein mátara (PIES) út, tað gekk væl.

Í nógvum av WP2-glúpunum var sjáldsama nógv av smáum veingjasniglum (*limacina*).

14-9-2017

Regin Kristiansen

Vend




Støðir á túri 1742